Kunngerðablaðið A

2026

Givið út 6. februar 2026

Nr. 13

6. februar 2026

**Kunngerð um broyting í kunngerð um veiðu eftir lodnu við fiskiførum undir føroyskum flaggi í íslendskum sjógvi í 2026**
(Broytt kvota og landingartreytir)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 8 frá 15. januar 2026 um veiðu eftir lodnu við fiskiførum undir føroyskum flaggi í íslendskum sjógvi í 2026 verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2 verður “1.760” broytt til: “9.446 tons”.

**2.** § 6 verður orðað soleiðis:

“**§ 6.** Av nøgdini sambært § 2 er til og við 17. februar 2026 loyvt føroyskum skipum tilsamans at landa í mesta lagi 7.084 tons til matna uttan fyri Ísland, ella at virka til matna umborð.
*Stk. 2.* Eftir 17. februar 2026 er loyvt føroyskum skipum tilsamans at landa til matna uttan fyri Ísland, ella at virka til matna umborð, í mesta lagi 4.000 tons.
*Stk. 3.* Virking til matna umborð og at landa til matna uttan fyri Ísland kann ikki halda fram, tá nøgdirnar sambært stk. 1 og 2, sum kunnu virkast til matna umborð ella verða landaðar til matna uttan fyri Ísland, eru brúktar.
*Stk. 4.* Nøgdin at landa til matna uttan fyri Ísland ella at virka til matna umborð á føroyskum skipum verður tilskilað í fiskiloyvinum.”

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, 6. februar 2026

**Sirið Stenberg (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm (sign.)